

# Hús í Havn

Ognin matr. Nr. 1002ap í Brekkuni 4 í Havn er til sølu um hóskandi boð fæst. Grundøkið 398 kvm. Húsini eru bygd í 1968 og liggja væl fyri, við góðum útsýni og í sera friðarligum umhvørvi.

**Í húsunum er:**
**Loft:** Gongd, lítið goymslurúm og tvey stór kømur.
**Miðhædd:** 115 kvm. Durur/gongd, køkur, stova, hjúnarúm, tvey kømur og baðirúm.
**Kjallari:** Íbúð á uml. 80 kvm. við køki, stovu, hjúnarúm, lítið kamar inn av stovuni, gongd/durur, baðirúm. Harafturat vaskikjallari við oljufýr inni. Inn av durinum er gjørt lítið amboðsrúm.
Bilskúrur (carport) og hjallur. Inngongd til hjallin er inn frá durinum í miðhæddini.

Áhugað kunnu venda sær til:
**Gunn Ellefsen: ge@lawfirm.fo**

Advokatfelagið við Strond 4
Yviri við Strond 4 · 100 Tórshavn
Tel 311260 · Fax 311261
advokatfelagid@kallnet.fo

SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperation

Starvslýsing

## Fíggjarleiðari til P/F Hotel Hafnia

Fyri P/F Hotel Hafnia verður søkt eftir fíggjarleiðara.

Á hotellinum starvast 40 fólk.

**Starvið**
Starvið fevnir m.a. um:
- Alt vanligt bókhaldsarbeiði,
- umsiting av lønartengdum viðurskiftum hjá starvsfólkum,
- gerð av fíggjarætlanum,
- gerð av mánaðar- og ársroknskapum, umframt
- at samskifta við stjórnina í fíggjarspurningum.

**Umsøkjarin**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur:
- Hollan kunnleika til bókhald,
- kunnleika til bókhaldsskipanina Concorde og Lundan,
- kunnleika til E-tollskipanina
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og
- evni at samstarva.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 1. apríl 2006

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 22 28 52.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f. spekt@spekt.fo www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85



## Vallarvørður í Gundadali

Tórshavnar kommuna søkir eftir vallarvørði til ítróttaøkið í Gundadali.

**Arbeiðsuppgávurnar eru m.a.:**
- at røkja vøllirnar og ítróttaøkið í Gundadali
- at gera umvælingar
- at ljósviðurskiftini eru í lagi
- at halda ítróttaøkið reint og ruddiligt
- at hava umsjón við virkseminum í Gundadali
- at samstarva við aðrar deildir í Tórshavnar kommunu m.a. reinhaldið og húsaumsitingina

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir arbeiðsfólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Lønin er sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag.

**Meiri fæst at vita**
Gjølligari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Boða Haraldson, býarverkfrøðing, á tlf. 302010.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2006. Viðmerkið umsóknina: Vallarvørður.

**Les meira um starvið á www.torshavn.fo/leysstorv**

T Ó R S H A V N A R   K O M M U N A

# Søkt verður eftir fólki

**til Gardin/Botex deild okkara, at byrja skjótast gjørligt.**

Starvið er hálvttíðarstarv, og verður lønt sambært avtalu.

Starvið fevnir um, kundatænastu, innkeyp, mát av gardinum v.m..

Førleikakrøv eru, at tú ert m.a. fyrikomandi, kundavinarligur og hevur gott hugflog.

Um hetta hevur tín áhuga og meira ynskist at vita, ber til at ringja til Profa Farvur, Eyðun, tlf. 319220 – 519220.

***Umsókn verður at senda til:***

***Profa Farvur, Staravegur 5,***
***Box 3137, 110 Tórshavn.***

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. apríl 2006.

profa FARVUR botex®

v/Eyðun Mouritsen · Staravegur 5 · Tórshavn
Tlf. 31 92 20 · profa.a.halsi@kallnet.fo